# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Carl Ole Olofson:

## Selt dekk í Føroyum í 25 ár



Mynd: Jens Kristian Vang

Hósdagin 9. desember hevði Sonne Smith samrøðu við ein danskan sølustjóra í Rás2. Talan var um Carl Ole Olofson, sølustjóra hjá dekkfyritøkuni Goodyear Danmark A/S.

Carl Ole Olofson er 61 ára gamal og útbúgvin bilmekanikari.

Hann hevur arbeitt hjá Goodyear Danmark síðan 1977, og hann hevur vitjað í Føroyum í arbeiðsørindum so at siga hvørt ár í 25 ár.

Fyrstu árini var Petur Jacobsen, sum í dag er stjóri á Rás2, Goodyear umboðsmaður í Føroyum.

Seinnu árini hevur hann ferðast kring landið saman við starvsfólkum hjá Super Dekk í Havn.

Annars hava Goodyear dekkini verið umboðaði í Føroyum síðan fyrst í 30-unum. Fyrstu mongu árini av bilfyritøkuni P/F Vilhelm Nielsen.

Í samrøðuni kom Carl Ole, ið er kendur sum ein sera fryntligur og fyrikomandi maður, inn á, hvussu nógv infrastrukturin í Føroyum er broyttur hesi 25 árini, hann hevur ferðast hendan vegin. Hann heldur, at vit hava eitt framúr gott veganet, og tað at vit skjótt kunnu koyra úr Vágum til Klaksvíkar er heilt »fantastiskt«.



## Litmyndir av brúðarpørum hvønn fríggjadag

Stórur áhugi er fyri at seta brúðarmyndir í blaðið, og hava vit tí gjørt av - sum nakað nýtt - at allar myndir av brúðarpørum til teigin »Heilsanir« hereftir koma í Sosialin hvønn fríggjadag í litum.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til »Heilsanir«, t.v.s. at tær kosta 30 kr.

Síðsta freist at lata myndirnar inn er mikudag kl. 12.00.

**Sosialurin**

Fyri 20 árum síðan:

## Mótaframsýning umborð á Norrönu í 1984



Í 1984 varð skipað fyri mótaframsýning umborð á Norrönu. Har var vístur nýggjasti klædna- og hármóti saman við tónleiki og dansi.

*Tríggjar havnargentur sýna nýggjasta mótan í 1984, f.v. Vivian Wraae, Barbara í Gongini og Haldis Poulsen*

*Mynd: Alan Brockie - Myndablaðið Nú*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin